**Fíggjarmálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 10. juni 2021 |
| Mál nr.: | 21/08868 |
| Málsviðgjørt: | EC |
| Ummælistíð: | 10-24. juni 2021 |
| Eftirkannað: | x. juni 2021 |

**Uppskot til**

# Kunngerð um broyting í kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan

(Grannskoðan av roknskapi fyri stuðul)

### § 1

Í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan, sum broytt við kunngerð nr. 181 frá 18. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 21 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4.* Stuðulsmóttakarin skal í seinasta lagi 1. apríl árið eftir lata stuðulsveitaranum roknskap sbrt. stk. 2 við møguligari váttan frá grannskoðara, sbr. § 22, stk. 2-3, og grannskoðanarprotokoll. Er talan um frágreiðing sbrt. stk. 3, skal frágreiðing latast stuðulsveitaranum í seinasta lagi 1. apríl árið eftir."

**2.** § 22, stk. 2 verður orðað soleiðis:
" *Stk. 2.* Roknskapur fyri stuðul, sum ikki eru fevndur av stk. 1, verður váttaður við grannskoðanarátekning sbrt. §§ 3-8 í kunngerð um grannskoðaravváttanir o.a., sbr. tó stk. 3."

**3.** § 22, stk. 3 verður orðað soleiðis:
" *Stk. 3.* Er talan um stuðul, sum er minni enn 500 tús. kr., kann við roknskapi, sum er fevndur av stk. 2, verða latin váttan um víðkaða gjøgnumgongd sbrt. §§ 9-11 í kunngerð um grannskoðaravváttanir o.a. Er talan um stuðul, sum er minni enn 100 tús. kr., verður krav ikki sett um váttan frá góðkendum grannskoðara."

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 10. juni 2021

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason